## DAGSINS MEINING

# Lagnunar speisemi

Stýrið í SEV avgjørdi at halda seg til ætlanina og seta upp tríggjar vindmyllur í Eysturoynni. Tað merkir, at SEV valdi ikki at fylgja áheitanini hjá Vinnumálaráðnum um at bíða við at seta vindmyllurnar upp. Aftur eitt skúladømi um, at SEV hevur rættiliga torført at kenna vitjunartíð sína.

Fyri fyrstu ferð hevur Føroya Landsstýri sett sær fyri at orða ein almennan orkupolitikk og gera uppskot um eina el-veitingarlóg. Henda lóg skal eftir ætlan eisini áseta nakað um viðurskiftini hjá SEV, sum í dag hevur einkarrætt til el-framleiðslu.

Formaðurin í stýrinum hjá SEV sigur, at SEV tekur væl ímóti ætlan landsstýrisins. Men kortini er SEV ikki sinnað at medvirka frá tí at skjøtul verður settur á hesa ætlan. Grundgevingarnar hjá Poul Arna Jacobsen kundi ein talimaskina havt greitt úr hondum líka so væl .

Í sjóforkláringini nevndi stýrisformaðurin, at SEV hevur samstarv við eitt privat vindmyllufelag. At íbindingin hevði elvt til órógv. At SEV tí sjálvt mátti hava tær næstu myllurnar, tí kanska var neyðugt at steðga vindmyllunum, um tær elvdu til órógv. Var tá talan um privata felagið, kundi tað fáa fíggjarligar avleiðingar fyri felagið....

-Eg meini tað! (Tað siga vit, tá onkur hevur sagt okkurt ivingarsamt, tápu- ella láturligt). Ikki eiti á umsorgan. Sum leikfólk loyva vit okkum at spyrja, um tøknin í teimum londum, sum hava fingist við vindmyllur í fjórðingsøld, ikki man vera so framkomin, at tey kunnu veita eina hjálpandi hond, um kervið hjá SEV fer at skikka sær illa og fær fjáltur á leiðsluna í SEV?

Ja, fjórðingsøld er síðan, at menn og fyritøkur fóru at menna og seta vindmyllur upp av álvara. Eisini í Føroyum talaðu undangongumenn fyri at royna hesa orkukelduna og vera við í hesi menning. Og longu tá varð eisini tosað um at fáa útbygt netið, so tað toldi at taka inn vindmyllur.

El-felagið hjá okkum - tær og mær - hevur verið alt annað enn jaligt og vit hava næstan bara hoyrt um alt tað neiliga í samband við vindorku. So er vindurin ov nógvur. So er eingin vindur. So er hann ójavnur. Og nú er grundgevingin, at tað er so avmarkað, hvussu nógv orka frá vindinum, kann latast inn á kervið hjá SEV.

Í umboðsnevndini eru tíbetur fólk, sum tykjast hava víðari sjónarring. Leiðsluni er - meira ella minni - álagt at troyta aðrar orkukeldur. Nú, fjórðingsøld eftir at aðrir fóru at royna, skal SEV so partú seta tríggjar vindmyllur upp. Tað merkir, at privata felagið sleppur ikki at halda fram at byggja út, sum tað kanska hevur lagt upp fyri, og SEV ger ímóti ynski landsstýrisins at bíða eina tíð. Hetta er láturligt, hetta er grátuligt. Ja, hetta er tragikomiskt - lagnunar speisemi!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jesus kemur skjótt

**John Vilhelmsen**

Í 1968 fekk ein 90 ára gomul kvinna frá Veldres eina sjón frá Gudi. Emmanuel Minos helt møti, har hon búði. Hon fekk høvi at greiða honum frá tí, hon hevði upplivað. Hann festi tað á blað, men helt tó, at tað tyktist so óskiljandi, at hann valdi at leggja tað í eina skuffu. Nú, nógv ár seinni, hugdi hann eftir tí og skilti, at hetta mátti hann siga onkrum frá. Niðanfyri standandi er skrivað av eftir eini upptøku frá einum møti í Sunnmøre í 1995. Henda gamla kvinna var ein vakin sannorða kristin, ið fekk gott viðmæli frá øllum, sum kendu hana. Sjónin umfatar hesi 4 umráðini:

1: Eg sá heimin sum eitt slag av globus. Eg sá Europa, land fyri land. Eg sá slíkt, sum fer at henda áðrenn Jesus kemur aftur, beint innan tann síðsta vanlukkan kemur yvir mannaættina. Ein vanlukka, sum vit áður ikki hava kent maka til. Beint áðrenn Jesus kemur, verður ein linni, sum vit ikki áður hava haft. Tað verður friður, og friðurin kemur at vara eina tíð. Í hesi friðartíð fara nógvar tjóðir at avvápna, eisini Noreg. Vit verða ikki fyrireika, tá tað kemur. Triði veraldarbardagi fer at byrja á ein hátt, sum eingin hevði væntað – og frá óvæntaðum staði.

2: Hugburðurin millum tey kristnu fer at verða meiri lunkaður enn nakrantíð áður. Eitt fráfall frá sannari og livandi trúgv. Kristin koma ikki at verða opin fyri rannsakandi boðskapi. Tey vilja ikki eins og áður hoyra um synd, náði, lóg, gleðiboðskap og heilaggering. Í staðin kemur ein eftirgerð: Eydnukristindómur. Tað ræður um at hava framgongd. Materiellar hentleikar, lutir, sum Gud aldri hevur lovað okkum á hendan hátt. Kirkjur, bønhús og fríkirkjur gerast alt meiri tómar. Í staðin fyri tann boðskap vit eru von við gjøgnum fleiri ættalið – sum t.d. at taka upp kross sín og fylgja Jesusi – vil undirhald, list og mentan ráða, har sum vekingarmøti áttu at verið. Hetta kemur at henda í stóran mun beint áðrenn Jesus kemur. Vanlukkur koma yvir okkum, og fólk koma at verða sovandi í teirra anda.

3: Tað kemur ein tíð fylt við moralskari syndran, sum gamla Noreg ikki áður hevur upplivað. Fólk fara at liva sum gift, uttan at vera gift (hetta var í 1968, og eg trúgvi ikki at hugtakið pappírleyst hjúnalag var til tá E. M.). Óreinska áðrenn hjúnalag og ótrúskapur í hjúnalagi fara at vera tað vanliga. Á allan hátt verður borið í bøtuflaka fyri tí. Tað vil eisini sníkja seg inn millum kristin, og vit geva eftir – eisini tá tað snýr seg um synd móti náttúruni. Beint áðrenn Jesus kemur aftur, fer sjónvarpið at verða fylt við harðskapi: ein harðskapur so ræðuligur, at tað vil læra fólk at drepa og oyðileggja hvønn annan. Tað verður vandamikið at ganga á gøtuni. Talið av sjónvarpsrásum verður stórt eins og innan úvarpið. Morð og oyðilegging verður roknaður sum undirhald og vil spjaða segt til alt samfelagið. Tey mest intimi tingini, sum hoyra hjúnabandinum til, fara at verða fyri opnum skíggja (hetta var í 1968, og eg mótmælti við at vísa á, at vit høvdu lógir sum forðaðu fyri slíkum. E. M.). Tá segði tann gamla konan »Tað kemur at henda, og tú vil fáa tað at síggja. Alt tað, vit áður hava havt, verður brotið niður og tað mest ósømiliga verður víst fyri eygum okkara«.

4: Fólk úr fátøkum londum vilja koma í stórum tali til Evropa (í 1968 høvdu vit ikki innflytarar E.M.) Tey koma til Norðurlond og til Noregs. Tey fara at gerast so nógv í tali, at fólk fara at vendast móti teimum. Tey verða viðfarin eins og jødarnir áðrenn kriggið (eg skilti ikki hetta tá og mótmælti E. M.). Tá runnu tár av kinnum hennara. Eg komi ikki at síggja tað, men tú kemur at síggja tað. Tá brádliga kemur Jesus aftur og triðji veraldarbardagi brestur á. Tað verður eitt stutt kríggj. Øll kríggj, eg áður havi upplivað eru sum spæl samanborðið við hetta. At enda verða kjarnorkubumbur nýttar, luftin verður dálkað, soleiðis, at ein ikki kann anda hana. Tað vil raka fleiri heimspartar: Amerika, Japan, Australia – tey ríku londini. Vatnið verður oyðilagt, jørðin kann ikki longur dyrkast. Úrslitið verður, at bert ein leivd verður eftir, og leivdin í teim ríku londunum vil royna at flýggja til tey fátæku londini, men tey verða líka hørð móti okkum, sum vit vóru móti teimum. Eg eri so glað fyri, at eg ikki komi at síggja hetta. Tá henda tíðin nærkast, mást tú taka mót til tín og siga hetta. Eg havi fingið hetta frá Gudi. Einki av hesum stríðir ímóti Bíbliuni – sí Op. 6 og fram eftir. Men tann sum hevur Jesus sum frelsara og harra, er tryggur.

# Nýggja el-veitingarskipan, takk!

**Oddmar Juul Samuelsen**

Viðvíkjandi orkuspurninginum í Føroyum, og hetta at orða ein orkupolitikk á økinum, so snýr tað seg einfalt um hetta at dagføra lógirnar, soleiðis at kappingarførið er tryggjað.

Vinnulív og fólk annars hava krav upp á, at teir fólkavaldu taka seg saman, uttan drál og uttanumtos, og geva Føroya fólki eina dagførda el-veitingarlóg á sama støði sum í okkara grannalondum, og ikki verri enn hana, sum er galdandi í Danmark, ið vit eru í ríkisfelagsskapi við, og sum liggur millum fremstu lond á økinum.

Til lesaran kann eg upplýsa, at har hevur Fólkatingið tikið avgerð um at skilja sjálvt el-netið frá veitarunum, og gera tað til eina sjálvstøðuga eind, so at fleiri veitarar fáa atgongd til at levera streym undir javnbjóðis sømdum, um hann so er frá dagsljósi, sólorku, vindi ella vatni. Við tí gomlu skipan, vit hava her á landi, koma vit ikki víðari.

Málið hevur skund.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Vildu vinna



*Kvinnurnar úr Havnar Fimleikarafelag høvdu hug at ergra seg eitt sindur um, at tað ikki eydnaðist at vinna kappingina í Danmark, men tær fegnast tó um annaðplássi*

**Kvinnuliðið í Havnar Fimleikarafelag fekk eitt annaðpláss í Danmarksmeistarask apinum í rútmiskum fimleiki. Munurin upp til vinnaran var tó so mikið lítil, at tað var ikki sørt, at tær føroysku høvdu hug at ergra seg**

FIMLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Kvinnurnar úr Havnar Fimleikarafelag, sum luttóku í DM í fimleiki um vikuskifti, fingu eitt munandi betur úrslit enn seinast.

Í fjør bleiv tað til eitt fjórða pláss, meðan tær fingu eitt annað pláss í ár, og var munurin upp til vinnaran so mikið lítil, at tað kundi sum onki farið báðar vegir. Tað gjørdi so, at kvinnurnar vóru eitt sindur harmar, men tó ikki vónbrotnar um úrslitið.

– Tá tær høvdu verið á gólvinum, høvdu tær eina kenslu av, at tað rættuliga væl, og tá munurin var so lítil, so er tað argiligt, at tað ikki skuldi blíva til eitt fyrstapláss, sigur Guðrun Gudjónsson, samskipari hjá Havnar Fimleikararfelag.

Tá øll liðini høvdu verið á gólvinum, fingu tey stig. Og tá avtornaði var munurin millum Greve, sum vann kappingina og Føroyar so lítil, sum hann kundi vera.

Í fríu seruni fingu Greve 19,0 stig, meðan Føroyar fingu 18,95 og í amboðs seriuni fingu donsku kvinnurnar 18,45 og tær føroysku 18,05. So talan var um sera lítlan mun á liðunum. Nummar trý bleiv Esbjerg við 35,6 stigum.

### Góð skoðsmál

Guðrun sigur, at føroysku kvinnurnar fingu avbera góð skoðsmál bæði frá dómarum, áskoðarum og hinum liðunum, sum hildu tað vera avbera flott, at tær megnaðu at vinna eitt annaðpláss.

Guðrun heldur, at støðið á donsku kappingini er á einum sera høgum støði, og ivast hon ikki í, at slíkur møguleiki er við til at menna føroyskan fimleik og at lokka fleiri til.

– Tað er bara ein kapping um árið í Føroyum, so tað er onki at taka seg aftur í, at hendan kappingin er ein gularót til føroysku fimleikararnar, sigur hon og leggur afturat, at tað somuleiðis fær føroyskum fimleikararnar at kempa meira. Eisini tað gott fyri føroyingar at kunna síggja onnur lið og harvið fáa íblástur og kontaktir uttan fyri landoddarnar.

Guðrun sigur, at tey tosaðu eisini við onkran um at fáa fólk hendan vegin at halda skeið.

Sum við gentuliðinum, sum fyri einari viku síðani vann gull, fingu kvinnurnar tó onki heiðursmerki, tí tær vóru gestalið. Men heiðurin av at vera næstbestar í ríkinum kann ongin tó taka frá teimum.

Fimleikurin fer nú í summarfrí og byrjað verður aftur í september.

# Komið út úr dunnuhylinum

**Felagið Synergi, sum hevu skipað fyri fleiri áhugaverdum og spennandi tiltøkum, bjóðar spennandi ráðstevnupakka í sambandi við stóru ráðstevnuna í Danmark, Strategi Resultat, sum Børsen, Microsoft og Franklin Covey Danmark skipa fyri**

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Tann 25. mai verður ein ráðstevna undir heitinum Strategi Resultat á Det ny Teater í Keypmannahavn.

Fimm danskir topleiðarar umframt heimskendi managementserfrøðingurin, Stephen Covey, fara at geva sítt boð uppá, hvussu evnini at halda fokus og raðfesta hava avgerðandi týdning fyri úrslitið hjá fyritøkuni. Skalt tú eini ørindi í Danmark, so ber til at leggja hetta saman við ráðstevnuni. Synergi heldur, at tað átti at verið spennandi og áhugavert fyri føroyingar at kunna fara til eina slíka ráðstevnu uttanlanda. Tær halda, at tað ræður um at koma út úr dunnuhylinum, og tí bjóðar felagið tveir ymsikar pakkar, og so kann tann áhugaði sjálvur velja.

1. Ferð við Atlantsflog 24-26. mai, ferðaavgjald og ráðstevnuluttøka
2. Ferð við Atlantsflog 24-27. mai, ferðaavgjald og ráðstevnuluttøka

Haldari av Børsen on line fáa 500 kr. í avsláttri. Um tú ynskir gisting, kunnu vit bíleggja hetta fyri teg. Vit hava avtalur við fleiri hotel.

### Spennandi upplegshaldarar

Seks ymiskir upplegshaldarar verða á ráðstevnuni.

Stephen Covey, rithøvundur, hevur skrivað bókina »Seven Habits of Highly Effective People«, sum er seld í 15 milliónum eintøkum – harav 50.000 í Danmark. Hann stendur á listanum hjá Time Magazine, sum ein av teimum 25 amerikanarum, sum hava størsta ávirkan.

Klaus Holse Andersen, Vice President, Microsoft Norðureuropa hevur ábyrgd fyri øllum virkseminum hjá Microsoft í Norðureuropa. Fekk hetta starv í apríl 2003, áður var hann stjóri í Microsoft Danmark.Martin Ågerup, rithøvundur og presidentur fyri »Akademiet for Fremtidsforskning« er stjóri í GCI Future og hevur serligan áhuga fyri tí rákið, ið er við at skapa samfelagið umframt tøknini, ið skapar framtíðina.

Alfred Josefsen, adm. stjóri, Irma varð útnevndur »Ársins leiðari 2003« og hetta ikki uttan orsøk. Hann var maðurin, ið bjargaði Irma og fekk virkið at blóma aftur. Eitt prógv uppá leiðaraevnini hjá Alfred Josefsen er, at Irma er farin frá einum 18'anda til eitt 7 pláss yvir bestu arbeiðspláss í Danmark, umframt at Irma eisini er á TOP-100 listanum yvir bestu arbeiðspláss í Europa.

Karin Verland, adm. stjóri, Pfizer Danmark er útlærd lækni. Í 2001 gjørdist hon stjóri í danska dótturfelagnum hjá Pfizer. Karin Verland leiddi samanleggingina av donsku deildini og Pharmacia í 2003, ein samanlegging sum resulteraði í verðins stórstu medisinalfyritøku, sum samstundis er tann medisinalfyritøka, ið kann vísa á skjótasta vøkstur.

Ulrik Bülow, adm. stjóri, Danmarks Turistråd hevur verið topleiðari í fleiri stórum donskum fyritøkum. Eitt nú var hann adm. stjóri í SONOFON, higani hann kom frá, tá hann gjørdist stjóri í Danmarks Turistråd. Kollegar kalla hann eina dynamiska resultatorienteraða eldsál.

Meira er at frætta um hesa ráðstevnuna og til ber eisini at tekna seg á heimasíðuni hjá Synergi, sum er www.synergi.fo